Sosialurin

**Í Miðlahúsinum 27. oktober 2010 kl. 20.00**

# Eru Føroyar um at kvalast í fólkaræði?

Í sambandi við at Sjúrður Skaale í dag, 27. oktober, gevur út bókina "Tá Jesus gjørdi nekaran hvítan", heldur hann fyrilestur í Miðlahúsinum í kvøld kl. 20.00.

Fyrilesturin kallast **"Eru Føroyar um at kvalast í fólkaræði?"**

Í vanligari talu er "demokrati" altíð eitt positivt orð. Jú meira demokratiskt okkurt er, jú betri er tað.

Og politiska skipanin í Føroyum er øgiliga demokratisk. Valluttøkan er høg. Vit hava nógvar flokkar. Vítt er til veggja í øllum flokkum. Sperrumarkið er lágt. Vit hava óvanliga nógvar politikarar í mun til fólkatalið. Teinurin frá veljara til politikara er sera stuttur.

Tað er alt samalt sera demokratiskt.

Men spurningurin er, um skipanin er OV demokratisk.

Kann tað hugsast, at landsins politiska leiðsla er so veik og kaotisk, tí demokratiið er farið ov langt?

**Eru Føroyar í veruleikanum um at kvalast í fólkaræði?**




*Les meira á www.skaale.org*

miðlahúsið í Vágsbotni

---

granskingarráðið
THE FAROESE RESEARCH COUNCIL

Bryggjubakki 12
Postrúm 259
FO-110 Tórshavn
Tel + 298 567800
gransking@gransking.fo
www.gransking.fo

# Hálvur hægguslokkur

**Granskingarráðið sóknast eftir einum fólki at taka sær av ymsum skrivstovuarbeiði, fyriskipan av tiltøkum o.a.**

**Vit hava brúk fyri:**
Einum fleksiblum fólki við royndum og/ella evnum innan hesi øki:

- elektroniska journal
- bókhaldskipanina hjá Gjaldstovuni
- kunning og samskifti

Tú mást eisini kunna átaka tær aðrar fyrifallandi uppgávur, stórar og smáar.

**Vit kunnu bjóða:**
Eitt hálvtíðarstarv við fyribils setan til 31.12.2011, við møguleika fyri leinging.
Eitt lítið arbeiðspláss í hugnaligum umhvørvi.
Fjølbroyttar uppgávur við frælsi at skipa arbeiðið innan avtalaðar karmar.

Setanartreytir eru sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið ella annað avvarðandi yrkisfelag.

**Um okkum:**
**Formliga:**

- umsita vit Granskingargrunnin, sum stuðlar verkætlanum við uml. 7 mió kr. árliga.
- eru vit skrivstova hjá Granskingarnevndini og Vísindaráðnum
- ráðgeva vit Landsstýrinum í granskingarpolitiskum spurningum
- eru vit sambindingarlið millum ES og Føroyar á granskingarøkinum FP7
- luttaka vit í norðurlendskum samstarvi um gransking

**Tað merkir, at vit:**

- eru í dagligum samskifti við granskarar, stovnar og virkir um stuðlaðar verkætlanir og um komandi verkætlanir
- arbeiða neyvt saman við miðfyrisiting og politisku skipanini um granskingarpolitikk
- ráðgeva í sambandi við føroyska luttøku í ES-granskingarskránni FP7 og í norðurlendskum samstarvi
- kunna um gransking og granskingarúrslit, m.a. á www.gransking.fo, í e-tíðindabrøvum, á Vísindavøku og øðrum tiltøkum

*Les meira um okkum á www.gransking.fo ella set teg í samband við Anniku Sølvará, stjóra, á tel 567800 fyri at fáa fleiri upplýsingar.*

**Umsóknarfreistin er 11.11.10.**
Umsóknir við avritum av prógvum v.m. kunnu sendast við teldupost til annika@gransking.fo ella við posti til: Granskingarráðið, Bryggjubakki 12 Postrúm 259, 110 Tórshavn.

---

Fólkaheilsuráðið
The Faroese board of public health

## Starvsfólk til Fólkaheilsuráðið í sambandi við kostárið 2011

Landsstýrismaðurin í heilsumálum hevur lýst 2011 at vera kostár, og tað verður m.a. Fólkaheilsuráðið, sum stendur fyri at skipa átøkunum. Í hesum sambandi søkja vit eftir tveimum fólkum við serligum kunnleika til matfrøði og fólkaheilsu at starvast hálva tíð hvørt í eitt ár.

Tað verður uppgávan hjá hesum fólkum at finna uppá og fremja ymisk átøk, sum hava til endamáls at gera matvanarnar í Føroyum so heilsugóðar sum til ber.

Umsøkjarar skulu hava serligan kunnleika til heilsugóðan kost umframt skapandi evni og góð samskiftis- og samstarvsevni.

Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráð og avvarðandi fakfelag.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Pál Weihe á fartelefon +298 216696 ella pal@health.fo

Umsókn við prógvum og ævilýsing (curriculum vitae) skal sendast til niðanfyristandandi adressu. Umsóknarfreistin er 15.11.2010.

**Fólkaheilsuráðið**
Eirargarður 2, 2 · FO-100 Tórshavn
teldupostur: fhr@folkaheilsa.fo
heimasíða: www.folkaheilsa.fo

---

fk **Matseðilin**

*Hósdagin 28. oktober*
**Bollar í karry - Kóka neytakjøt**

*Fríggjadagin 29. oktober*
**Lasagna - Rivjasteik - Hønsafrikkasé**

*Leygardagin 30. oktober*
**Rullusteik**

*Mánadagin 2. november*
**Stoktur medistari - Svínakambur**

*Týsdagin 3. november*
**Forlorin hara - Stoktur hønsarungi**

*Mikudagin 4. november*
**Stoktur fiskur - Kjøtfrikadellir**

*Til ber at keypa døgurða við heim*

**Matstovan í Hoyvík**

---

# FOBISKEIÐ
## Tankafeltterapi

Hevur tú onkra fobi – er bangin fyri onkrum ávísum – kann tú fáa góða viðgerð og samstundis læra teg at viðgerða teg sjálva/sjálvan.
Skeið verður 6. og 7. nov. – 20. og 21. nov. – 4.og 5. des. Kl. 10-16.
Adr: Sálarfrøðistovan, Tórsgøta 17. Tórshavn

Tilmelding á tlf. 218286

Jegvan Bæk
Aut. sálarfrøðingur



